# Nói, Albinói

**Eftir valið verður høvið at síggja nýggjasta íslendska filmin, sum í fleiri førum er virðisløntur og hevur fingið besta skoðsmál í heimsins største filmastíðarriti, Variety.**

FILMSSÝNING
*tíðindaskriv*



*Tómas Lemarquis hevur høvuðsleiklutin sum Nói, ið er albino*

Fyrsti filmurin, KLIPP sýnir í nýggja árinum, er úr Íslandi. Eins og í undanfarnu filmum henda veturin, er talan um ein ungan leikstjóra, Dagur Kári, sum hervið ger sín fyrsta spælifilm. Heitið er "Nói, Albinói".

Filmurin er um trupla dreingin Nóa, sum er albino og býr á bygd í Íslandi. Happing ger ikki tilveruna lættari.

Hesin hugvekjandi, virðislønti filmur verður sýndur í Norðurlandahúsinum mikudagin hin 21. januar 2004 klokkan 20:00.

Heimsins stórsta filmstíðarrit Variety segði um íslendska filmin: »Icelandic cinema digs out a major new talent with NÓI ALBINÓI, the feature début of award-winning short filmmaker Dagur Kári. Portrait of a gifted teen rebelling against lifes limits in a frozen coastal village communicates directly with auds through an inspired mix of realism, humor and metaphor.«

Filmstíðarritið Variety vitjaði í Føroyum, tá filmstevna var í Norðurlandahúsinum í 1989 og Katrin Ottarsdóttir sýndi fyrsta spælifilmin »Atlantic Rapsody«.

Aktuelli íslendski filmurin "Nói, Albinói" vann í fjør virðisløn sum besti norðurlendski filmurin á stevnu í Göteborg. Samstundis fekk filmurin Moviezone virðislønina í Rotterdam og tvær fyrstuvirðislønir í franska býnum Angers, har ungir, evnaríkir evropeiskir filmsleikstjórar verða bodnir á hvørjum ári.

# Føroyskur 200-krónuseðil

**À fyrsta sinni er ein føroyskur 200 krónu seðil útgivin**

PENGAR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Danmarks Nationalbank boðaði mánadagin frá, at ein nýggjur føroysku tveyhundraðkrónuseðil er útgivin. Hetta er fyrstu ferð, at ein føroyskur pengaseðil við 200 krónu virði verður útgivin. Undan 200 krónu seðlinum eru nýggir 100- og 50 krónu seðlar.

Tað er Zacharias Heinesen, sum hevur prýtt nýggja pengaseðilin. Myndin á seðlinum er av einum firvaldi. Firvaldurin á nýggja føroyska 200-krónuseðlinum er hulda, Hepialus humuli.

- Hon er um allar Føroyar og um mesta partin av Evropa. Kallhuldurnar eru tó ólíkar til útsjóndar. Kallhuldurnar á meginlandinum hava hvítar veingir. Føroysku kallhuldurnar hava summar heilt ljósagular veingir, summar dimmari og summar næstan svartar veingir, oftast við dimmum blettum ella rípum. Tað er henda kallhuldan, sum prýðir 200-krónuseðilin, verður sagt í tíðindaskrivi.

Føroyskir pengaseðlar eru danskir pengaseðlar við føroyskum motivum. Skuldi nakar verið í iva, so kunnu vit siga, at lutfallið er 1:1 millum føroyskar og danskar seðlar.




Endurgivið við loyvi frá Danmarks Nationalbank



# Endabrestur í Bládýpinum

LØGTINGSVAL
*Tíðindaskriv*

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag bjóðar til endabrest í Bládýpinum í kvøld, mánakvøldið, kl 21.

Á skránni er sangur, tónleikur og politiskur rakstur.

Kom og sig tína hjartans meining um politisku dagsskránna.

Helena Dam á Neystabø og Bjarki Mohr skipa fyri.

Jógvan Olsen spælir.

Øll eru vælkomin - jú fleiri jú betri, siga tey í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag













